## Nýggjur bygdarvegur

**Norðoyri:** Ætlanin er at gera ein nýggjan veg uttanfyri gomlu bygdina á Norðoyri. Talan er um ein 10 metrar breiðan veg við gongubreytum á báðum síðum, og sum kemur at ganga 2 metrar inn á lendið í bygdini. Neyðugt verður tí hjá kommununi at keypa hetta lendið. Omanfyri tann uttara endan av vegnum eru nøkur grundøki longu matrikulerað, men við ætlaða vegnum mugu hesi økini regulerast samsvarandi. **(sb.)**



## Barnamøtir á Svangaskarði

**Toftir:** Hóskvøldið byrjar samkoman Nebo á Toftum eina røð við barnamøtum á Svangaskarði. Møtini halda fram til sunnudagin. Á skránni er: Bíbliusøgur við drama, nógvur sangur, spurnakapping, framhaldssøga og mangt annað. Aftaná barnamøtið sunnudagin verður nátturði at fáa, og tí bjóðar samkoman børnunum at taka alla familjuna við til hetta møtið. Tað er sunnudagsskúlin í Nebo, sum skipar fyri barnamøtum. Tey gleða seg at síggja nógv børn til møtini. **(sb.)**

# Nógv vilja byggja í Sundalagnum



*Stórur áhugi er at byggja ymisk sløg av húsum*
*Mynd: Sunda.fo*

**Nógv hús standa í løtuni í gerð í Sunda kommunu. Talan er bæði um vanlig sethús, tvíhús og onnur sambygd hús**

SETHÚS
*Snorri Brend*

**Sundalagið:** Orsøkin til henda stóra áhugan at byggja, eru helst teir høgu húsaprísirnir í Havn. Í Sundalagnum kunnu tey bara staðfesta, at fólk leita sær út á bygd, um tey vilja seta føtur undir egið borð.

– Tað er tó greitt, at fólk fyri langari tíð síðan hava funnið leiðina norður í Sundalagið, og hetta sæst nú aftur í sethúsabyggingini, verður sagt úr Sunda kommunu.

Hetta fegnast tey í kommununi um, tí tað fer eisini at gera sítt til at røkka málinum fyri nýggju Sunda kommunu, at verða ein sterk og savnandi eind fyri alt økið.

Víst verður á, at barnatalið er vaksandi, samstundis sum kommunan leggur stóran dent á, at hava ansingartilboð til øll, ið hava tørv á tí, eins og skúlarnir verða dagførdir so hvørt.

– Umframt hetta eru stórar íløgur gjørdar á røktarøkinum, verður sagt.

Ennerætlaðaútstykkingin í Hósvík ikki byggibúnað. Tá hetta gerst veruleiki, helst fyrst í komandi ári, kemur enn størri gongd á byggingina, tí har er størsta talið av fólki, sum bíðar eftir grundstykki.

# Bíða nú eftir skúlanum

**Fríggjadagin legði ein arbeiðsbólkur fram álit sítt um ein nýggjan Húsarhaldsskúla í Klaksvík. Á fundinum vóru væl av fólki, millum annað mentamálaráðharrin, Jógvan á Lakjuni og borgarstjórin í Klaksvík. – Tað skal ikki stranda uppá okkara vilja fyri nýggja skúlanum, lovar Steinbjørn O. Jacobsen**

SKÚLAR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Leiðarin á Húsarhaldsskúlanum, Jóhanna á Tjaldrafløtti ynskir betri umstøður til undirvísingina*
*Mynd: Høgni Thomsen*



*Á framløguni fríggjadagin fingu mentamálaráðharrin, Jógvan á Lakjuni og leiðari á skúlanum, Jóhanna á Tjaldrafløtti møguleika at tosa saman um útbúgvingina og skúlan*
*Mynd: Høgni Thomsen*

**Klaksvík:** Í samfull 33 ár hevur Húsarhaldsskúli Føroya tikið ímóti næmingum úr øllum landinum. Trupulleikin er bert tann, at pláss er einans fyri 21 næmingum á hvørjum skeiði.

– Hetta er alt ov lítið til at nøkta tørvin hjá teimum mongu, sum hava hug at taka eitt styttri ella longri húsarhaldsskeið her á skúlanum, vísti arbeiðsbólkurin á.

Síðani 1999 hevur skeiðið verið fullteknað, og tað vísir seg bara, at bíðilistin bara vaksin ár undan ári. Tá skeiðið byrjaði í august mánaði í ár vóru ikki færri 40 næmingar á bíðilista!

Skúlin fær haraftrat javnan fyrispurningar um at skipa fyri ymiskum skeiðum, men vegna plásstrot eru ikki møguleikar fyri hesum í løtuni.

Eingin ivi er tó um, at verður ein spildurnýggjur skúli bygdur, til at kunna taka ímóti 40 næmingum á hvørjum skeiði, fer hetta at geva ein heilt annan skúla og munandi betri umstøður til næmingarnar.

### Væl umtóktur

Í álitinum verður greitt víst á stóra tørvin á nýggjum skúla. Hann er bæði ov lítil og livir ikki upp til krøvini fyri einum skúlum skúla í dag.

Arbeiðsbólkurin sær tí ikki annan møguleika enn at nýggjur skúli verður bygdur í Klaksvík. Spurningurin er bara hvar.

Steinbjørn O. Jacobsen sigur við Sosialin, at býráðið er fult greitt yvir umstøðurnar á skúlanum.

– At tað standa 40 næmingar á bíðilista – tað er: tveir flokkar – tá skúlin byrjaði í august, man vera besta tekin um, at skúlin hevur sera gott orð á sær, staðfestir borgarstjórin.

Arbeiðsbólkurin ynskir at nýggjur skúli verður bygdur. Og hesi hugsan tekur borgarstjórin undir við.

– Eg skilji væl, at skúlin vil hava sína egnu lon til undirvísingina. Og vit hava í roynd og veru økir, har ein slíkur skúli kundi verðið bygdur, sigur hann.

Ta einu tíðina varð Gerðabøur nevndur. Men á nýggja byggiøkinum Undir Fossum er eisini ein møguleiki, har ein slíkur húsarhaldsskúli kundi ligið, uttan tó at nøkur avgerð er tikin í hesum máli.

– Her eru nógvir møguleikar opnir, staðfestir Steinbjørn O. Jacobsen.

Nú er í øllum førum sett ferð á eina tilgongd, sum einaferð í framtíðini fer at enda við einum spildurnýggjum Húsarhaldsskúla í Klaksvík.